

# Jólini í Mentanarhúsinum

Hvønn dag frá 18. til 23. desember, undantikið 20. , er jólacafé í Mentanarhúsinum frá kl. 16 – 19. Hetta er ein café, sum ymsir skúlaflokkar skipa fyri, har inntøkan fer til námsferð hjá flokkunum. Eisini fær jólacaféin vitjan av navnframa og barnakæra Búa Sibbidibbidimdimdubadabadam 23. desember kl. 17. Fríggjakvøldið kl. 21 verður cafékvøld og barr. Tá verður konsert við Høgna Lisberg, sum fer at spæla løg av nýggju fløguni hjá sær. Leygarkvøldið verða tvær konsertir. Onnur er ein barna- og ungdómskonsert við Ragnari og The Dreams. Hendan konsertin byrjar kl. 18 og møguligt verður at fáa autografar frá teimum aftaná. Kl. 23.30 verður konsert og dansur við The Dreams. Annað jólakvøld, besta dansikvøldið á árinum, verður dansur við dansibólkinum 4ever. Til hendan dansin verður 18 ára aldursmark. Triðja jólakvøld ella 27. desember kl. 22 verður dansur við 200 til eitt sokallað BadTasteNineties kvøld, har tveir DJs, B.A.B.Y og Mrs Duplo, eisini skiftast um at lokka fólk á dansigólvið. Nýggjársaftan verður so aftur dansur kl. 01-04. Hetta kvøldið syrgir Wolfgang fyri góðum og fjølbroyttum dansitónleiki fyri vaksnum.

# Vit eru til reiðar um íløgan er skilagóð



*Meðan alt sá út til at virka betur enn í dag – Nónhamar landar á Kósini í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eg og Jóhan Páll tosa saman dagliga, og vit hava framvegis samband við Føroya Banka um skipini, ið eftir eru, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari í Klaksvík**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt av teimum feløgum, sum vístu teimum seks partrolarunum í Klaksvík, ið Føroya Banki fyrr í heyst keypti á tvingsilssølu, áhuga, var reiðaríið hjá Kristiani Martin Rasmussen.

Tey seks skipini, sum áður vóru undir hattinum hjá Maru Seafood, vóru Navarin og Borgarin, Nónhamar og Fjalshamar og Safir og Smaragd.

- Vit hildu, at okkara boð var hóskandi í mun til, hvørjum standi skipini vóru í, og hvussu útlitini eru fyri framman. Men tað helt Føroya Banki ikki, sigur Kristian Martin Rasmussen.

Føroya Banki og TG Fish í Suðuroy, sum út við fimmti eigarar standa saman um, samdust um prís, og Navarin og Borgarin endaðu soleiðis í Suðuroy.

Føroya Banki seldi eyka fiskidagar við Navaranum og Borgaranum. Hetta merkir, at av teimum tilsamans seks partrolarunum, sum Føroya Banki nú átti, verða fýra skip seld útaftur – tvey og tvey við fiskidøgum til trý skip.

### Framvegis áhugi

Føroya Banki eigur nú fýra av hesum skipum eftir, og framvegis liggur felagið hjá Kristian Martini Rasmussen fram við til at keypa av tí, eftir eftir er.

- Jú, vit hava samband við bankan. Tað gongur seint, men vit eru framvegis áhugaðir, um skipini kunnu keypast fyri ein prís, ið vit halda er skilagóður.

Reiðarin vísir á, at ymiskt skal gerast við skipini, áðrenn tey kunnu loysa, og útlitini hjá ísfiskaflotanum eru so sum so í løtuni.

- Eg kann ikki siga, hvat okkara boð var upp á øll seks skipini – og eg kann ikki siga, hvat vit í dag halda vera hóskandi fyri skipini, ið eftir eru.

Kristian Martin Rasmussen heldur, at tað gongur seint við at finna út av skipamálinum.

- Vit eru nógv upptiknir av øðrum viðurskiftum, nú vit um ein góðan mánaða ella so skulu yvirtaka nýbygningin í Chili, men vit práta saman – og vit lurta.

Reiðarin í Klaksvík endurtekur, at teir framvegis eru áhugaðir í ísfiskatrolarunum, um prísurin er á leið tað, sum teir halda, at skipini kunnu bera.

### Kenna ábyrgd

Spurdur, um samband er millum felagið hjá honum og Jóhan Páll Joensen, stjóra í Maru Seafood, sigur Kristian Martin, at partarnir tosa saman dagliga.

- Jú, vit tosa saman um tingini og møguleikarnar, og vit vilja fegnir verða við til at lyfta undir, nú tað sansar at í Klaksvík. Hetta kenna vit sum ein part av okkara ábyrgd, nú vinnuligu útlitini her norðuri eru hótt, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari.

# Vilja verða við til endurreisn – um neyðugt



*Tómligt við bryggjukantin á Kósini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Vit keypa ikki Kósavirkið, men vilja stuðla undir at endurreisa virkið, um tað gerst neyðugt, og vit fáa møguleikan til tess, sigur Kristian Martin Rasmussen, nótaskipareiðari**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Støðan í Klaksvík er ógvuliga trist og deprimerandi, nú skip eru farin av bygdini, og arbeiðsfólkið á Kósini eru søgd úr starvi, sigur Kristian Martin Rasmussen, nótaskipareiðari.

Sum skilst á reiðaranum, er ikki hugsandi, at felagið hjá honum og synum hansara fer at keypa virkið á Kósini, um tað skuldi farið fyri bakka.

Men tað er als ikki óhugsandi, at teir vilja vera við til lyfta undir eina endurreisn, um hetta gerst neyðugt, og teir fáa møguleikan til tess.

- Okkara øki er í fyrsta lagi skiparakstur, men kunnu vit verða við til at stuðla undir í eini møguligari og skilagóðari endurreisn, eru vit avgjørt ikki negativir.

Reiðarin sigur, at felagið hjá honum fer ikki út í nakra verkætlan – bara fyri at fara – men málið hjá teimum er alla tíðina at reka vinnuligt virksemi, sum hongur saman og kastar av sær.

- Klaksvíkin er í eini keðiligari og deprimerandi støðu í løtuni, og vit kenna okkara ábyrgd, nú ísfiskatrolararnir eru farnir, og eingin fiskaframleiðsla er á Kósini, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari.